# Stórir fjalldagar

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stívt andøvsgul upp í hvasan vind av eystri og landnyrðingi og møguliga regn eitt skifti, annars turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Hann minkar vindin niður í lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið regn. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Hann veksur vindin upp í hvassan vind av suðri og útsynningi og ælingur. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, týsdagin minni vindur og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 11 stig.



**Næstu vikuna verða fjøllini gingin kring alt landið, og í heystfrítíðini plaga tað at vera nógvir fjallmenn í útoyggjunum**

FJALLTÍÐ
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tá ið dagurin í morgin verður av, fara skúlarnir í heystfrí í eina viku. Heystfrítíðin er eina viku fyrr nú, enn hon var tað inntil fyri nøkrum árum síðani. Meðan heystfrítíðin í Føroyum er flutt fram, hava teir í Danmark flutt heystfrítíðina hinvegin. Donsku skúlarnir plagdu at hava heystfrí í vikuni frammanundan, at føroysku skúlarnir høvdu heystfrí. Nú hava donsku skúlarnir heystfrí í vikuni eftir, at føroysku skúlarnir hava havt heystfrí.

Í heystfrítíðini verða nógv tey flestu skurðfjøllini gingin. Tað valdast sjálvandi um veðrið. Men um tað er á einari leið, so munnu teir báðir næstu leygardagarnir at verða størstu fjaldagarnir.

Lítið fólk er vanliga í útoyggjunum. Í heystfrítíðini fjølgast fólkið nógv á smáplássunum. Hetta er bæði strevin og hugnalig tíð. Vónandi verður veðrið til vildar, og vónandi fer tað at gangast væl hjá fjallmonnunum og øllum teimum, sum stuðla teimum og hjálpa til.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 16 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 13 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 15 |
| Keypmannah. | 16 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 14 |
| Berlin | 16 |
| Warzawa | 16 |
| Kiev | 16 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 21 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 25 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 20 |
| New York | 27 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 30 |
| Panama | -- |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 988 hPa. vestan fyri Írland fer í landnyrðing eystan. Eitt annað lágtrýst, 999 hPa. eystan fyri Hetland grynnist.




**Í dag:**
Lágtrýstið sunnan fyri Føroyar fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið haðani verður nær Føroyum fríggjadagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 3/10 kl. $06^{00}$– 4/10. $06^{00}$. Hitin í gjár: 7,3°
Minsti hiti máldur í oktober: - 0,5° - Mesti hiti máldur í oktober: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 3/10 kl. $06^{00}$– 4/10 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í oktober: 0,0 mm

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

22. september Mánin longst frá jørðini
30. september Fyrra kvarter
6. oktober Mánin næstur jørðini
7. oktober Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. Okt | 04.49 | 17.13 | 03.49 | 16.13 | 04.04 | 16.28 | 06.49 | 19.13 | 07.49 | 20.13 | 03.04 | 15.28 | 02.04 | 14.28 | 05.04 | 17.28 | 06.04 | 18.28 | 04.34 | 16.58 | 05.49 | 18.13 |
| 5. Okt | 05.37 | 17.57 | 04.37 | 16.57 | 04.52 | 17.12 | 07.37 | 19.57 | 08.37 | 20.57 | 03.52 | 16.12 | 02.52 | 15.12 | 05.52 | 18.12 | 06.52 | 19.12 | 05.22 | 17.42 | 06.37 | 18.57 |
| 6. Okt | 06.18 | 18.42 | 05.18 | 17.42 | 05.33 | 17.57 | 08.18 | 20.42 | 09.18 | 21.42 | 04.33 | 16.57 | 03.33 | 15.57 | 06.33 | 18.57 | 07.33 | 19.57 | 06.03 | 18.27 | 07.18 | 19.42 |
| 7. Okt | 07.07 | 19.32 | 06.07 | 18.32 | 06.22 | 18.47 | 09.07 | 21.32 | 10.07 | 22.32 | 05.22 | 17.47 | 04.22 | 16.47 | 07.22 | 19.47 | 08.22 | 20.47 | 06.52 | 19.17 | 08.07 | 20.32 |
| 8. Okt | 07.57 | 20.23 | 06.57 | 19.23 | 07.12 | 19.38 | 09.57 | 22.23 | 10.57 | 23.23 | 06.12 | 18.38 | 05.12 | 17.38 | 08.12 | 20.38 | 09.12 | 21.38 | 07.42 | 20.08 | 08.57 | 21.23 |

5 707265 100043 >